Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 238 - 11. desember 2009

## Samráðingarleiðari rýmdi av fundi



Samráðingarleiðarin hjá 130 menningarlondum rýmdi seint í gjárkvøldið av fundi við danska formansskapin á veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn. Lumumba Stanislaus Di-Aping, samráðingarleiðari, segði við TV2, at Danmark er í ferð við at forkoma veðurlagsráðstevnuni. Lumumba Stanislaus Di-Aping var í øðini inn á donsku stjórnina, tá bretska blaðið The Guardian fyrr í vikuni kunngjørdi eitt skjal, sum sambært blaðnum var eitt danskt uppskot til eina veðurlagsavtalu. G77-samráðingarleiðarin segði, at menningarlondini fóru undir ongum umstøðum at góðtaka tað, sum stóð í tí skjalinum.

## ES-ósemja um pengar

Ríkis- og stjórnarleiðararnir í ES-londunum eru ósamdir um, hvussu nógvar pengar samveldið skal veita menningarlondunum, so tey kunnu fíggja tey nógvu tiltøkini, sum skulu avmarka veðurlagsbroytingarnar, og sum skulu setast í verk longu næsta ár. ES hevur fyrr mett, at menningarlondini skulu hava millum 37 og 53 milliardir krónur um árið tey næstu fýra árini, men á toppfundi í gjár vóru bara fimm lond til reiðar at geva tilsøgn um hjálp. Bretland, Svøríki, Belgia, Danmark og Finnland søgdu seg vilja lata tilsamans fimm milliardir krónur um árið í trý ár.

# Havi góða barlast við mær

**Nýggi trivnaðarstjórin hjá Tórshavnar kommunu kemur frá einum starvi sum aðalskrivari hjá Kommunusamskipan Føroya, og kennir tí væl til tey viðurskifti og teir trupulleikar, sum stóru kommunurnar í Føroyum arbeiða undir og berjast við**

TRIVNAÐARSTJÓRI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Tað er ikki enn heilt greitt, nær Jóan Petur Hentze tekur við sum trivnaðarstjóri hjá Tórshavnar kommunu, men tað verður so kjótt, sum tilber*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Jóan Petur Hentze er settur sum nýggjur trivnaðarstjóri í Tórshavnar kommunu og tað er eitt starv, sum hann sær fram ímóti við spenningi.

- Tað er eitt øki. har eg havi mín áhuga, og sum eg havi arbeitt innan síðani eg fekk mína útbúgving, og tá trivnaðarøkið hjá Tórshavnar kommunu er stórt og rakar breitt, næstan allar borgarar í kommununi, so er tað í sær sjálvum ein stór avbjóðing, sigur Jóan Petur Hentze.

Eitt annað, sum eisini hevði stóran týdning, tá hann gjørdi av at søkja starvið var, at talan er um eitt øki, ið veruliga hevur týdning og ger mun.

- Tað verður tosað um, at vit skulu fáa fólk heim aftur til Føroya, og har hevur Havnin ein avgerandi leiklut sum høvuðsstaður. Og at vera við til tað, sjálvt um tíðirnar fíggjarliga ikki eru tær bestu, er ein stór avbjóðing. Økið fevnir jú heilt frá sosialmálum yvir til skúla og mentan, sigur Jóan Petur Hentze.

Hann sigur, at økið hevur ógvuliga stóran týdning, tí verður tað ikki røkt á besta hátt, kann tað kosta við tað, at høvuðsstaðurin kann missa fólk.

- Tað er tí ein stór avbjóðing fyri kommununa at tryggja eina støðuga menning, ikki bert í býnum her, men í allari kommununi, sigur Jóan Petur Hentze.

### Má hanga saman

Tá eitt slíkt starv verður søkt, verður sjálvandi umhugsað, hvat starvið inniber og hvar setast skal inn. Soleiðis eisini hjá Jóan Petur Hentze.

- Nú hevur kommunan júst gjørt og ger stórar íløgur á skúlaøkinum, og tveir stórir skúlar eru í ferð við at verða bygdir, og barnaansingarøkið er um at vera fult útbygt, so tað, ið nú liggur fyri framman, er eldraøkið, sigur Jóan Petur Hentze.

Hann heldur, at har liggur ein stór uppgáva fyri framman uttan mun til, um eldraøkið verður lagt út til kommunurnar at umsita ella ikki.

- Øll økini innan trivnaðarøkið hava stóran týdning hvør sær, og tú kanst ongantíð siga, at nú er liðugt á barnaansingarøkinum ella á øðrum økjum, tað er neyðugt, at alt hongur saman, sigur Jóan Petur Hentze.

Hann sigur, at trivnaðarøkið rakar næstan allar borgarar í kommununi, antin so ella so. Foreldur hava børn í ansing ella í skúla, fólk hava foreldur í eldraansing, og øll kunnu gera nýtslu av mentanar- og ítróttatilboðum.

- So tað eru ikki ávís øki, ið skulu mennast serstakt, men sjálvandi eru altíð nøkur øki, har íløgur skulu gerast, og beint nú eru tað skúlaøki og røktarøkið, sigur Jóan Petur Hentze.

### Góða barlast

Nýggi trivnaðarstjórin var ein av berandi kreftunum á fótbóltsliðnum hjá AB í 90-árunum, so ætlar hann at leggja serligan dent á ítróttin?

- Sjálvandi brenni eg fyri ítróttinum, men ikki bert honum. Alt mentanarøkið er umráðandi, og har hevur Havnin veruliga spent seg út og hevur skapt nakrar karmar, sum geva grundarlag fyri at tað økið er fult á hædd við onnur øki innan trivnaðin í kommununi, sigur Jóan Petur Hentze.

Hann sigur, at hann ikki er ítróttamaður burtur av, men heldur er fyri alla mentan. Og hann hevur í veruleikanum eina góða barlast at taka við starvinum, tí hann kemur frá starvi sum aðalskrivari hjá Kommunusamskipan Føroya.

-Eg meti avgjørt, at eg taki nakrar royndir við mær í nýggja starvið. Ein partur av arbeiðinumn seinasta árið hevur verið kommunureformurin, sum landsstýrið hevur sett skjøtil á. Har hava vit verið ígjøgnum nærum alt, ið hevur við kommunur at gera, so eg havi eitt gott innlit í kommunalu verðina, sigur Jóan Petur Hentze.

Harumframt hevur hann eisini arbeitt við sosialum og mentanarligum málum í undanfarnum størvum.

- Eg eri væl latin í, so tað verður spennandi at sleppa til arbeiðis við fólkunum niðri í trivnaðarumsitingini, sigur Jóan Petur Hentze.

Hann dugir ikki enn at siga, nær hann ítøkiligt tekur við sum trivnaðarstjóri hjá Tórshavnar kommunu, men tað verður so skjótt sum tilber.